# Dupult gull til Havnina

**Havnar Telvingarfelag vann greipuna, tá finalurnar í ungdómstelving vóru á skránni**

TALV
*tíðindaskriv*

Leygardagin 27. mars 2004 skipaði Talvsamband Føroya fyri finalu í ungdómstelving fyri lið. 4 telvarar eru á hvøjum liði og umhugsingartíðin er 10 minuttir í part til hvørt talvið.

Klaksvíkar Talvfelag hevði finaluna í Ósáskúlanum og var finalan hegnisliga løgd til rættis og avgreidd undir sera góðum umstøðum.

Kapping er skipað soleiðis, at telvararnir eru býttir í tveir aldursbólkar. Yngri aldursbólkurin er telvarar til og við 4. skúlaflokk, meðan eldri bólkurin fevnir um telvarar frá 5 – 10 flokk.

Undankappingar hava verið í Vestmanna og á Argjum í mars mánað 2004. Í eldra bólkinum kvalifiseraðu 6 lið seg til finaluna, meðan undurtøkan hjá teim yngru bert rakk til ein finalubólk uppá 3 lið. Umframt finalubólkinum var eisini opin bólkur hjá teim eldru fyri liðum, sum ikki høvdu kvalifiserað seg til finalubólkin.

Eins og í 2003 fór Havnar Telvingarfelag avstað við gullinum í báðum bólkunum.

Úrslit — 5. flokk og eldri:

| | |
|---|---|
| HT1 | 33,5 |
| KTF1 | 25,5 |
| KTF2 | 18,0 |
| HT2 | 17,0 |
| KT1 | 13,5 |
| HT3 | 12,0 |

HT1 vann finaluna sannførandi og KTF1 var eisini greitt á øðrum plássi. Undankappingarnar vístu sama mynstrið – Havnar Telvingarfelag nr. 1 og Klaksvíkar Talvfelag nr. 2. Tó vann HT innanhýsis dystin í finaluni tepurt, við 4,5 móti 3,5. KTF2 tryggjaði sær 3 plássið við m.a. at vinna innanhýsis dystin ímóti KTF1 við 5 stigum ímóti 3.

Á vinnandi havnaliðnum vóru: Helgi Ziska, Rógvi Mortensen, Margar Berg og Hjalti Toftum Jógvansson. Havnar Telvingarfelag vann undankappingarnar sera sannførandi — felagið vann 86 talv út av 88 møguligum. Helgi og Hjalti megnaðu at telva undankappingar og finalu uttan at tapa nakað talv. Helgi fekk samanlagt 31,5 út av 32 møguligum, meðan Hjalti telvdi 3 javnleikir.

Í opna bólkinum vann TT sannførandi. TT fekk 3 pláss í fyrstu innleiðandi kappingini, men luttók ikki í næstu kappingini á Argjum og rakk tískil ikki finalubólkin.

| | |
|---|---|
| TT | 23,5 |
| Rókur1 | 13,5 |
| KTF3 | 7 |
| HT5 | 2 |

Á vinnandi Toftaliðnum vóru: Arnhold Jacobsen, Jógvan Juul Olsen, Andrias W. Danielsen og Oddur Højgaard.

Úrslit — 4. flokkur og yngri:
Úrslitið í yngra finalubólkinum gjørdist neyvt hitt sama sum í undankappingunum.

| | |
|---|---|
| HT4 | 10,5 |
| VT | 7,5 |
| Rókur | 6,5 |

Á vinnandi havnaliðum vóru: Heiðrikkur Jacobsen, Olaf R. Samuelsen, Eli Nolsøe Leifson og Tóri Jacobsen. og Dánjal P. Nielsen.

### FM á Toftum

Í døgunum 3. – 10. apríl fara nógvir av ungu telvarunum at royna seg í FM fyri einstaklingar sum í ár er á Toftum. Ungdómstelvingin er í menning og áhugin fyri kappingini er sera stórur — 37 unglingar hava teknað luttøku og er hetta nærum ájavnt metinum í unglingabólkinum sum var sett tá FM kappingin var í Havn 2003 – tá luttóku 41 unglingar.



*Tað eydnaðist Havnar Telvingarfelag at vinna bæði 4. og 5. flokk, tá kappast varð í Ósáskúlanum í Klaksvík um vikuskiftið*



*Í Høllini á Kambsdali var spenningurin á fimleikarunum stórur, tá tey gjørdu seg til at sýna ymsu kynstrini*
*Mynd: Jonhard Hammer*



*Eisini yngstu fimleikararnir sluppu framat á Kambsdali*
*Mynd: Jonhard Hammer*



*Fimleikararnir hava lagt nógv fyri í vetur, og fyri áskoðararnar var framsýningin um vikuskiftið hugtakandi*
*Mynd: Jonhard Hammer*



*Støkk hevur leingi verið í føroyska fimleikaoddinum, og hetta er ikki ein støða, sum tykist skula broytast alt fyri eitt*
*Mynd: Maria Olsen*



*Mong mundu tey avvarandi vera, sum fylgdu spent við, tá yngstu Støkk-genturnar sýndu sína seriu fram*
*Mynd: Maria Olsen*



*Og sjálvandi var so eisini pláss til teirra, sum hava vant fimleik í nøkur ár. Nakað sum eisini sást aftur í avrikunum*
*Mynd: Maria Olsen*

# Fimleikur í Eysturoynni

**Bæði Støkk og Fok høvdu framsýning um vikuskiftið**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*

Hetta er tíðin, tá venjingarnar hjá ymsu fimleikafeløgunum kring landið fara at halla.

Sum síður hevur verið í heilt nógv ár, so verður hetta eisini markerað við eini framsýning, har íðkararnir í ymsu feløgunum sýna fram nakað av tí, sum tey hava lært í vetur.

Í Eysturoynni hevur fimleikurin havt stóra framgongd seinnu árini. Annars hevur tað leingi verið so, at fimleikur í Eysturoynni var nakað, sum fólk settu í samband við Støkk, men seinnu árini eru fleiri onnur fimleikafeløg eisini komin til har um leiðir.

Millum tær framsýningar, sum vóru um vikuskiftið, var tann hjá Fimleikafelagnum Fok úr Gøtu. Framsýningin hjá teimum varð hildin í Høllini á Kambsdali, har hópur av áskoðarum fylgdu við, tá fimleikararnir sýndu kynstir síni fram.

Eisini Støkk hevði sína framsýning um vikuskiftið. Hetta var sjálvandi í Ítróttarhøllini í Runavík, har felagið framvegis hevur sínar sýningar, tó at sjálvar venjingarnar aloftast fara fram í Støkk-høllini á Glyvrum, har Støkk eisini hevur heima.

Myndafólk okkara vóru á staðnum, tá sýningarnar fóru fram, og sum lesarin her kann staðfesta, so er tað eitt sindur av hvørjum, sum íðkararnir hava lært í vetur.



## Húsavørður

### til Mentanarhúsið í Fuglafirði

Søkt verður eftir húsavørði. Arbeiðstíðin kann verða skeivar tíðir.

**Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum:**
- At taka sær av praktiskum uppgávum í húsinum. T.d. seta stólar upp/niður.
- At gera ábøtur og viðlíkahald.
- Annað fyrifallandi arbeiði.

**Vit síggja fegin at tú:**
- Hevur handverkara-førleika.
- Hevur evnir at arbeiða sjálvstøðugt.
- Ert álítandi og raskur.
- Hevur evnir at samstarva og at vera fyrikomandi.
- Hevur koyrikort.

**Vit bjóða:**
- Spennandi og sjálvstøðugt arbeiði í tøttum samstarvið við leiðaran.

**Løn og setanartreytir:**
- Løn sambært avtalu við nevndina.
- Starvið verður at seta skjótast tilber.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Sólarn Solmunde,
leiðara, á tlf. 444950.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2004.

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m. skal sendast til:

Fuglafjarðar Sjónleikarafelag
Karvatoftir 5
Boks 14
530 Fuglafjørður

**brævbjálvin skal viðmerkjast: »umsókn húsavørður«**






**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3748
Navn: Sp/f MSP
Adressa: Oman Hoydalar 3, 188 Hoyvík

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 26.03.2004
Viðtøkudato: 26.03.2004
Kapitalur: Kr. 290.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 290.000,00 í øðrum virðum til kurs 1,310.
Stovnari: Magnus S. Petersen, Oman Hoydalar 3, 188 Hoyvík.
Stjórn: Magnus S. Petersen, Oman Hoydalar 3, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka virksemi innan ídnað, handil og íløguvirksemi og annað yrki í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 30. mars 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3747
Navn: Sp/f Saltkeyp
Adressa: 510 Gøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 24.03.2004
Viðtøkudato: 24.03.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100
Stovnari: Heri Thomsen, 510 Gøta.
Stjórn: Tórhallur Thomsen, 510 Gøta.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 24.03.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka keyp og sølu og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 30. mars 2004

Kristin Balle

---


SETEPLIR & HANDILSTØÐ

Á GOYMSLU

Grafik Studio 318293

MBM

Fóður | 410 Kollafjørður
Tel. 479035 | Fax 479030



Hjá Peturi
360 Sandavágur
Tel. 333320

P/F Niðri á Møl
220 Skálavík
Tel. 361231

MBM Fóður
800 Tvøroyri
Tel. 372454

Kirkjuteig
210 Sandur
Tel. 361072

MBM Fóður
700 Klaksvík
Tel. 457249


**Mentamálaráðið**
**Fólkaskúladeildin**

## Niðanfyri nevndu størv eru leys at søkja:

Fyribilssettur varaskúlastjóri í Tofta skúla í tíðarskeiðnum **1. august – 31. desember 2004**

Fyribilssettur varaskúlastjóri í Sankta Frans skúla í tíðarskeiðnum **1. august 2004 – 31. juli 2005**

Varaskúlastjóri í Vestmanna skúla frá **1. august 2004**

Fyrstilærari í Viðareiðis skúla frá **1. august 2004**

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Víst verður annars til nærri lýsing av hvørjum starvi sær á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum www.mmr.fo

Umsóknirnar skulu verða Mentamálaráðnum **í hendi í seinasta lagi týsdagin 6. apríl 2004**.
Umsóknarblað liggur á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um størvini, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

*Tórshavn, 23. mars 2004*
**Mentamálaráðið**
**Hoyvíksvegur 72 - Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 355050 - Fax 355055 - e-postur: MMR@MMR.fo**

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo